SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR

# 9 nýggj føroysk met upp á 9 dagar



*Føroysku svimjararnir fingu framúr úrslit í Køge, tá kapping var á skránni um vikuskiftið*

**Níggju nýggj føroysk met vórðu set, tá føroyskirs svimjarar um vikuskiftið kappaðust í Køge. Av hesum átti Elspa Mørkøre tey seks**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Farna vikuskiftið vóru svimjarar úr Fuglafjarðar svimjifelag, Ægir og svimjifelagnum FLOT á stórari svimjistevnu í Køge, har tey vunnu flest gullmerki av øllum, í kapping móti 500 aðrar svimjarar. Elspa Mørkøre setti 6 nýggj føroysk met, og samstundis setti Kári á Høvdanum tvey føroysk met sum luttakari á donsku stutthyljameistarastevnuni í Århus. Og vikuskiftið áðrenn tók Pál Joensen úr Vágs svimjifelag føroyska metið í 200 firvald frá Iani Skylv Hansen, sum annars hevur átt tað síðani 1993.

Og tað eru ikki bara tey sum svimja skjótt. Ungir svimjarar sum Pauli Ø. Mohr og Høgni Miné-Rasmussen svimja nú um dagarnar so skjótt, at teir hótta við at skapa enn eitt ættarliðsskifti longu áðrenn teir gomlu eru hildnir uppat at mennast.

Stóri føroyski vinnarin var ikki óvæntað Elspa Mørkøre, sum vann heili 12 gullmerki í kappingini.

Tey nógvu gullheiðursmerkini hjá Elspu gjørdu eisini at vit føroyingar »vunnu« kappingina, um vit meta eftir tí mátistokki sum vit vanliga brúka í Føroyum.

Danir telja tó ikki á heilt sama hátt, men umrokna fyrst heiðursmerkini til stig. Og tí gjørdist vinnarin SK Laxen úr Svríki við 16.733 stigum. Føroyar fingu 14.614 stig.

Kári á Høvdanum luttók sum nevnt samstundis á donsku meistarastevnuni, og setti har nýggj føroysk met í 50 og 100 rygg. Metið í 100 rygg átti hann sjálvur áðrenn, og tað var tí kanska einki serligt. Men hitt tók hann frá Eivindi Eysturoy, soleiðis at Kári nú einsamallur eigur allar tær bestu føroysku tíðirnar í ryggsvimjing. Og tað hóast hann enn bara er juniorur.

### Met í Klaksvík

Pál Joensen úr Vágs svimjifelag var ikki við í Danmark, men hann svam óvanliga gott vikuskiftið undan hesum á stevnu í Klaksvík. Hann hevur mennt seg í øllum teinum og greinum, og vann tí eina rúgvu av gullheiðursmerkjum har. Hann vann bæði í blandaðari svimjing - har ein kompletur svimjari sum hann eigur at kunna gera seg galdandi - og í greinum sum 50 firvald og 50 bringu, har tað annars verður hildið at spesialistarnir ráða. Og so endaði hann við at svimja eina tíð í 200 firvald einsamallur, har hann setti nýtt føroyskt met.

### Vetrar FM og NjM

Komandi vikuskiftið er vetrar-FM í Havn, og spenningurin millum tey sum vóru í Køge, og tey sum nú vilja prógvað at tey eisini høvdu kunnað gjørt mun. Ikki minst, tí tey yngru ikki smæðast við at taka kampin upp.

Fyrst í desember er norðurlendska juniormeistarastevnan í Finnlandi, har í øllum førum tey trý Pál, Elspa og Kári hava aldur at luttaka. Úrslitini frá donsku meistarastevnuni vísa at hetta als ikki verður nakar dansur á rósum hjá føroyingunum. Men um vit skulu hava ein kjans til heiðursmerki, so eru hesi trý allarhelst okkara besta boð nakrantíð.

## FAKTA

**Tey 9 nýggju metini**

| | |
|---|---|
| 400 frí hjá kvinnum: | Elspa Mørkøre 4:26.48 |
| 100 blandað hjá kvinnum: | Elspa Mørkøre 1:06.92 |
| 200 rygg hjá kvinnum: | Elspa Mørkøre 2:21.32 |
| 50 firvald hjá kvinnum: | Elspa Mørkøre 30.13 |
| 200 frí hjá kvinnum: | Elspa Mørkøre 2: 06.76 |
| 50 frí hjá kvinnum: | Elspa Mørkøre 27.16 |
| 50 rygg hjá monnum: | Kári á Høvdanum 27.77 |
| 100 rygg hjá monnum: | Kári á Høvdanum 59.05 |
| 200 firvald hjá monnum: | Pál Joensen 2:16.07 |

# FM í talvi fyri børn og ung 2006



*Nógv stendur upp á spæl, tá yngru telvararnir kring landiði fara at kappast um FM-heitið*

**Talvsamband Føroya skipar aftur í vetur fyri Føroyameistarakapping fyri børn- og ung einstaklingar í talvi. Kappingin verður skipað í 5 ymiskum aldursbólkum, og er samstundis úttøkukapping til NM-kappingina 2007**

TALV
*tíðindaskriv*

Kappingin um FM-heitið verður í somu aldursbólkum sum til NM-kappingina. Tað vil siga, at telvararnir verða býtt í fimm aldursbólkar.: 1987-1989, 1990-1991, 1992-1993, 1994-1995 og telvarar fødd í 1996 og seinni.

Skipað verður fyri 3 kappingum, har tvær tær fyrstu eru úttøkukappingar til endaligu finaluna. Fyrsta av kappingunum verður í Vestmannna tann 4. november, og er tað Bygdarhúsið, sum verður karmur um hesa. Næsta kappingin verður í Klaksvík tann 11. november, og verður hendan skipað eftir sama leisti.

Sjálv finalan verður í Havn tann 2. desember, og sleppa tey átta bestu úr innleiðandi kappingunum við til hesa. Tá verða telvd sjey umfør, har allir møta øllum. Hvør telvari hevur 30 min. í part til hvørt talvið.

Í finaluni verður nr. 1 í hvørjum aldursbólki Føroyameistari, nr. 2 gerst nr. 2, o.s.fr. Steyp verða latin til nr. 1, 2 og 3 í finaluni.

Umframt føroyameistaraheitið, kvalifisera nr. 1 og 2 í hvørjum aldursbólki seg til árligu Norðurlandameistara-kappingina í Talvi fyri einstaklingar, sum hesuferð verður í Íslandi - í februar mánað 2007.

Birgir fekk herda revsing:

# Fekk harðari revsing

Eystari landsrættur hevur hert dómin, sum fyrrverandi formaðurin í HB fekk fyri at hava fingið ein útlendskan spælara hendanvegin uttan at lúka treytirnar.

Í oktober í fjør bleiv dømdi Føroya rættur Birgir Enghamar 10 daga treytað hefti við eitt árs royndartíð, tí hann hevði fingið ein útlendskan fótbóltsspælara til Føroya uttan at lúka treytirnar um at geva honum løn.

Nú hevur málið verið fyri í Eystara landsrætti, sum herdi dómin, skrivar Dimmalætting.

Í landsrættinum bleiv fyrrverandi HB-formaðurin dømdur 60 dagar treytaða fongsulsrevsing við tvey ára royndartíð.

**-árni**